## Schmeichel til Eriksson

Notts County, ið spælir í fjórðbestu ensku deildini, hevur tryggjað sær danska málverjan, Kasper Schmeichel, sum sostatt gevst í Manchester City. Tað vil siga, at ungi Schmeichel aftur sleppur at samstarva við Sven-Göran Eriksson, ið hann áður hevur havt yvir sær í Manchester City. Svenskarin er nýggjur fótbóltsvosti í Notts County, sum hann skal royna at fáa allan vegin upp í Premier League næstu árini.



## Torres heldur fram

Tey mongu feløgini, ið hava gingið við vónum um at fingið spanska landsliðsspælaran, Fernando Torres, frá Liverpool, máttu fríggjadagin síggja í eyguni, at tað hendir ikki í bræði. Torres hevur skrivað undir nýggjan fýra ára sáttmála við Liverpool, ið rindar honum 3,8 milliónir krónur í løn um mánaðin. Fernando Torres hevur síðstu tvey árini skorað 50 mál í 84 dystum fyri Liverpool.




**Balazs Sinko, ið kemur undan uttast til høgru, hevur júst smekkað bóltin í málið hjá Víkingi og lagt ÍF á odda 3-1. Øssur Dalbúð, ið átti uppleggið úr høgru síðu, stendur »rangstøðutryggjaður« aftan fyri baklinjuna og hyggur at, meðan bólturin er í ferð við at tamba málmeskarnar hjá Víkingi**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Víkingur-ÍF 2-3 (0-1):

# Rændu alt frá Víkingi

**Víkingur**

**ÍF**

**Tá fuglfirðingar fyrst vóru komnir í gongd í Sarpugerði, lótu teir stórt sæð einki liggja eftir til Víking, ið ikki megnaði at vinna seg innaftur á vælupplagda ÍF-liðið**




Hilmar Jan Hansen

Tað skerst ikki burtur, at Víkingur í innanhýsis kappingini við grannarnar í Fuglafirði hevur arvað góðu hagtølini hjá GÍ, sum næstan ongantíð setti stig til ímóti ÍF – og so slett ikki á heimavølli. Undan dystinum í gjár hevði Víkingur vunnið tveir landskappingardystir og tveir steypadystir á ÍF í ár, so tølini talaðu ikki fyri, at ÍF skuldi gera nakrar skreytir.

Men tað løgdu teir á ÍF-liðnum einki í. Eftir eina javna byrjan í dystinum, byrjaðu teir at gera meira um seg, og eftir at teir høvdu lagt seg á odda sjey minuttir fyri steðgin, hugdu teir ongantíð aftur um seg aftur, men vórðu verandi á odda restina av dystinum.

Onkuntíð stóð nógv á hjá ÍF, og serliga ímóti endanum royndi Víkingur at leggja trýst á, so tað mista skuldi vinnast innaftur, men tað munaði bara ikki. Heldur ikki, hóast ÍF fekk ikki færri enn tríggjar verjuspælarar skaddar og ta allarsíðstu løtuna mátti spæla við Rógva Jacobsen í verjuni!

### Øssur profilurin

At byrja við í dystinum tóktist serliga Andrias Lava Olsen væl upplagdur, og einar tríggjar ferðir spurtaði hann frá Áka Petersen á høgra bakki, ið helst mundi prísa seg lukkuligan fyri, at Andrias seinni í hálvleikinum fór yvir í hina síðuna at spæla. Eisini har gjørdi Andrias onkrar »expressferðir«, men tað gjørdist bara ikki ordiliga vandamikið.

Bæði lið høvdu sínar góðu langskotsroyndir, ið serliga Sølvi Vatnhamar og Aleksandar Jovevic royndu seg við, áðrenn hol kom á, men annars blivu ikki so ítøkiligir kjansir í opna spælinum, til ÍF mestsum vísti vegin og legði seg á odda.

Mest eyðsýndi spælarin á vøllinum skuldi tó ikki vísa seg at vera Andrias Lava Olsen, tí hann átti sín part í fyrsta málinum, tá hann misti bóltin aftan fyri miðjuna. Í staðin gjørdist stóri profilurin í dystinum Øssur Dalbúð, ið alla tíðina skapti órógv í verjuni hjá Víkingi, umframt at hann í sambandi við tvey av málinum mestsum spældi sær við mótstøðumenninar, so sannførandi var hann.

### Grannauppgerð

Hetta var ikki ein dystur, har alt var, sum tað plagdi. Tó fornoktaði tað seg ikki, at talan var um eina grannauppgerð, tí menn stríddust so hjartaliga um hvønn einasta leysa bólt, og viðhvørt vóru vøddarnir spentir ríkiliga.

Tað var kortini ÍF, ið dró longra stráið og vann ein uppibornan sigur. Fyrst og fremst við at seta seg á tað mesta av spælinum á miðvøllinum, og síðani við at fáa sum mest burtur úr Øssuri, ið ikki setti ein skeivan fót á vøllinum í Sarpugerði, men snøgt sagt gjørdi alt rætt.

Hóast Víkingur legði nógv fyri í endanum á dystinum, rakk tað bara ikki til meira. Og glósurnar í fyrra hálvleiki um, at »fuglfirðingar eru føroyameistarar, bara teir vinna á Víkingi«, hoyrdist einki aftur til, sum dystinum leið. Tað var ið hvussu er ikki nógvur føroyameistari yvir Víkingi í gjár.

## Hyggja enn niðureftir

Abraham Løkin, sum síðstu dystirnar hevur verið knýttur av venjaratoyminum hjá ÍF, var sera væl nøgdur eftir sigurin á Víkingi, men vildi kortini ikki siga, at ÍF er leyst av niðurflytingarvandanum:

– Fyri tað um vit vinna henda dystin, kenna vit okkum ikki tryggar. Enn hyggja vit bara niðureftir og royna at vinna okkum nøkur stig. Vit gera okkara besta, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur hann.

– Fyrr í ár hevur ÍF ikki havt marginalarnir við sær, og kanska hevur spælið eisini verið eitt sindur ov tilvildarligt. Nú royna vit at spæla meira beinleiðis, og tað sær út til at muna. Henda dystin gjørdu vit okkara arbeiði og teir sítt, men tað gekk bara betri hjá okkum enn teimum.

*hil*

## Taptu fyri betri liði

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, ásannaði eftir tapið fyri ÍF, at hansara lið ikki hevði havt ein góðan dag, men tapti fyri einum liði, sum var betri.

– Vit hava havt eitt gott tíðarskeið, men sum hesin dysturin myndaði seg, hava vit ikki somu orku, sum vit hava havt. At kalla allan dystin vóru vit ein metur aftanfyri, segði hann.

– ÍF spældi skilagott, spælararnir vóru tendraðir til dystin, og til tíðir spældi ÍF eisini sera góðan fótbólt. Vit royndu at trýsta teir ímóti endanum, men samanumtikið var sigurin hjá ÍF ikki óuppiborin.

*hil*

## Málini

**0-1 (38.):** Víkingur misti bóltin í uppspælinum, og Andy Olsen gjørdi skjótt av og sendi bóltin fram til Øssur, sum fintaði og tamdi, áðrenn hann fluktaði í málið.

**0-2 (56.):** Eftir horna í høgru síðu, skallaði Bartal Eliasen ímóti málinum, men Geza Turi hálvbjargaði, so bólturin kom út til Aleksandar Jovevic. Hann smekkaði lágt innfyri í trunkan framman fyri málinum, og har fekk Øssur Dalbúð sett fótin á.

**1-2 (57.):** Bara ein minutt seinni fekk Súni Olsen fatur á bóltin í høgru síðu á ÍF-hálvuni og sendi inn í brotsteigin. Finnur Justinussen var fyrstur á, men sendi víðari til Andrias Lava Olsen, ið rak seg leysan høgrumegin og skoraði trygt.

**1-3 (71.):** Øssur Dalbúð fekk bóltin í høgru síðu, sneiddi ein verjuspælara av, kom til baklinjuna og spældi út frá, har Balazs Sinko fekk góðar stundir og gott pláss at senda bóltin í málið.

**2-3 (83.):** Í einum av álopunum hjá Víkingi var Andrias Lava Olsen heldur óneyðuga skumpaður í ryggin dygst inni við stongina, og dómarin dømdi brotsspark. Súni Olsen skoraði trygt úr 11 metrum.